Maskinmeistarafelagið

og

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

§ 1

§ 1. Partarnir eru samdir um, at teir persónar, sum koma undir sáttmálaøkið hjá Maskinmeistara-felagnum, og sum starvast á tí kommunala sáttmálaøkinum, og ikki eru fevndir av sáttmálanum fyri SEV og IRF, fylgja tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið fyri alment settar maskinmeistarar á landi.

§ 2

Partarnir viðgera møgulig mál og taka til avgerðar flokkingar á kommunala sáttmálaøkinum fyri limir í felagnum.

§3

Henda avtala kann uppsigast við í mesta lagi 3 mánaðar freist, roknað frá endanum av tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmálaskeiði millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið. Verður henda avtala uppsøgd, fer hon úr gildi samstundis, sum táverandi sáttmálaskeið millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið endar.

§ 4

Avtalan verður undirskrivað í tveimum eintøkum, og fær hvør partur sítt eintak.

Tórshavn, 30. august 2025

| Maskinmeistarafelagið | Kommunala Arbeiðsgevarafelagið |
|---|---|